

## Hanus G. í Stóra Pakkhúsi

Allarhelst eru tey mong, ið fegnast um, at Hanus G. Johansen nú ferðast kring landið við nýggju sangunum til yrkingarnar hjá Poul F. Joensen, og leygarkvøldið 20. mars verður Hanus G. í Stóra Pakkhúsi í Vági. Hanus G. Johansen telist ivaleyst millum fremstu tónleikararnir í Føroyum, og fløga hansara við yrkingum hjá Poul F., ið nevnist "Gaman og Álvara", hevur verið sera væl umtókt seinnu árini. Nú hevur Hanus G. skrivað løg til fleiri yrkingar hjá Poul F., og er tað júst hesi løg, ið hann framførur ymsa staðni í landinum hesar dagar. 20. mars verður tiltak í Stóra Pakkhúsi í Vági, har Hanus G. fer at framføra hesi løg, og forsølan byrjar í morgin.

# Teir kvaldu eldin

**Tveir menn, sum lupu til, tá ið eldur fríggjadagin var í snikkaravirkinum inni á Fjørð í Vestmanna, eiga heiðurin fyri, at eldurin ikki breiddi seg, sigur kriminalpolitiið**

ELDUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Kriminalpolitiið hevur nu staðfest orsøkina til, at eldur fríggjadagin kom í snikkaravirkið inni í gamla timburhandlinum inni á Fjørð í Vestmanna.

Undir loftinum á virkinum hekk ein hitablásari, ein kaloriefer, og motorurin gav heita luft frá sær.

Hiti hevur verið í leigunum, hevur sett eld í spønir, og eldurin hevur haðani breitt seg niður á gólvið.

Hetta kundi havt enda galið, um ikki tveir menn á einum virki beint við, fóru beinanvegin á staðið, tømdu tveir eldsløkkjarar móti eldinum og lótu síðan hurðina aftur.

Upp á tann mátan kvaldu teir eldin, og tað eiga teir rós fyri, sigur kriminalpolitiið.

Høvdu teir ikki gjørt hetta, kundi skaðin verið nógv størri, tí inni á virkinum var nógv timbur, sønir og annað.

Lítil løtu einni kom sløkkiliðið, og eldurin varð beinanvegin sløktur.

Politiið fekk brunatekniska hjálp úr Danmark til at kanna orsøkina til eldin.



*Skaðin av eldinum var ikki so stórur, og tað var fyrst og fremst monnum, sum fóru á staðið beinanvegin, at takka fyri*
*Mynd: Hilbert Elisson*

## Teirra egna ketta

Mangt løgið upplivir politiið eisini.

Um vikuskiftið ringdi ein kona til politiið. Hon hevði sæð ein deyðan hund liggja í urtagarði sínum og troystaði sær ikki sjálv at taka hann upp. Tí bað hon politiið um hjálp.

Tað vísti seg, at deyða djórið ikki var nakar hundur. Djórið var teirra egna ketta, sum lá har deyð. Hon hevði verið burturi síðan oktober.

# Tamdu mannin við stavi og piparsprayi

**Ein maður varð seint sunnukvøldið handitkin eftir at hava hótt politiið við knívi**

HARÐSKAPUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*veir politistar fóru eftir manninum, sum hótti við knívi. Annar brúkti stavin, hin sprændi piparspray móti honum*

Um tíggju tíðina sunnukvøldið fór inn fullur maður inn í eini hús í Havn, og av tí at maðurin var hóttandi, varð ringt eftir politinum.

Tá ið politistarnir komu inn, royndu teir fyrst at tosa við mannin, men knappliga hevði hann knív á lofti.

Politistarnir stóðu í øðrum endanum á eini smalari gongd, og maðurin stóð í hinum endanum. Teir róptu á hann um at blaka knívin, men einki hjálpti.

Eina ferð helt annar politisturin seg til at sláa knívin úr hondini á manninum við stavinum, og samstundist sendi hin piparspray móti monnunum.

Tá hjálpti, og teir fingu avvápnað mannin.

Hann var tikin við á politistøðina, og lækni metti tað bera til at seta tann fulla mannin í arrestina fyri náttina.

Kriminalpolitiið tók yvir í málinum mánamorgunin og ætlaði at fáa mannin varðhaldsfongslaðan, men tað mettu løgfrøðingarnir ikki grundarlag vera fyri, og maðurin varð tí latin lesysur.

Hann varð tó skuldsettur fyri at hava hótt politiið við knívi.

